*Árni Olafsson, „the grand old man“ í oljutilgongdini:*

# – Vandar eru men vit megna tað um vit vilja

Jan Müller

Tað eru trettan ár síðani, at Árni Olafsson, fór í gongd við uppgávur, sum hava samband við fyrireiking av oljuvinnu undir Føroyum. Fyrsti spakin varð settur í, tá Atli Dam, táverandi løgmaður setti Árna Olafson, Halgir W. Poulsen og Hjallgrim Hilduberg at gera frágreiðingar, sum skuldu verja søk føroyinga at yvirtaka undirgrundina. Seinni varð sett donsk-føroysk embætismannanevnd at fyrireika yvirtøkuna, og tað bar í sær, at Árni fekk innlit í oljuviðurskifti. Tí vóru eisini boð eftir Árna, tá fyrsta Oljuráðleggingarnevndin varð vald. Tá vóru sera fá fólk, sum høvdu nakra vitan um oljumál í heila tikið.

Seinni kom Árni eisini í nevndina, sum skuldi samráðast um markið. Og tað var tí heldur ikki so løgið, at Árni Olafsson var millum mongu fólkini, sum vóru við til handanina av oljuloyvunum í Norðurlandahúsinum 17. august. Hann heldur dagin í Norðurlandahúsinum vera enn eitt vegamót á oljuøkinum og frøðist um, at tað hevur gingist so væl.

- Hetta er so eisini ein byrjan fyri oljumyndugleikarnar og samfelagið. Nú skal leitast av álvara.

Árni Olafsson heldur úrslitið av 1. umfari vera gott. Hann heldur at nóg nógv feløg søktu og harvið fekk man eisini ta kappingina man ynskti. Hann metir eisini treytirnar, sum vit hava sett oljufeløgunum vera rættar og rímuligar og er sum heild samdur við tí, sum embætisverkið og politiska skipanin eru komin ásamt um.



Herálvur Joensen, Árni Olafsson og Martin Heinesen hava allir havt ein týðandi lut í allari oljutilgongdini.



*Sum altíð hevði Árni Olafsson eisini ein speiskan og skemtiligan „bemerkning“ henda dagin. -Olja fæst eisini úr hesi plantuni. Her er hann saman við Jette Eirikstoft, skrivara í Oljumálastýrinum*

### Orðaskifti

Summi halda, at orðaskiftið um avleiðingarnar manglar í øllum útviklinginum. Hvat sigur Árni til tað, nú hann sjálvur hevur verið ein týðandi partur av hesum útviklingi!

- Eg síggi eitt nú húsaprísirnar í Havn sum eitt úrslit av, at ein rúgva av fólki flytur til Havnar bæði av bygd og úr útlandinum og ikki sum eina avleiðing av, at nøkur oljufólk koma henda vegin.

Sjálvur sigur hann seg hava roynt at gera vart við tey negativu árinini, sum kunnu standast av eini oljuvinnu. Um so onnur hava tikið hetta upp í nóg stórum álvara veit hann ikki.

- Tú sær ikki hesa nýggju vinnuna sum ein vanda?

- Jú, sjálvt vavið av hesum kann sjálvandi gerast ein vandi og tað má ein royna at tilbúgva seg so væl til sum møguligt. Men eg dugi ikki at síggja, at alternativið er at siga nei til oljuvinnu. Antin eru vit so bangin, , at man sigur nei til oljuvinnu, ella sigur man, at oljuvinnan kemur, og so ræður um at tilbúgva seg so væl sum gjørligt. Og hann heldur ikki, at vit eru ov sein á sjóvarfallinum í so máta. Nakað er gjørt og meira kann gerast.

---

*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins:*

# Mugu fáa orðaskifti um oljuvinnuna

Jan Müller

– Hetta er ein søguligur dagur, nú tað er sett hol á eina nýggja vinnu í Føroyum sigur formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, sum var ein av mongu politikarunum, sum hevði leitað sær niðan í Norðurlandahúsið hósdagin at vera við til handanina av søguligu loyvunum til oljuleiting.

Sjálvur hevur hann fleiri ferðir sagt, at ein oljuvinna kann vera ein ótrúlig hjálp fyri tað føroyska samfelagið. Tað kann blíva tað beinið, sum vit kunnu standa á aftrat saman við okkara fiskivinnu. Samstundis er oljuvinnan eisini ein stór avbjóðing fyri okkara politikarar. -Eg síggi tað sum okkara fremstu uppgávu nú - ikki at fáa sum mest burtur úr sum gjørligt men kanska meira hetta at tryggja, at árinið á føroyska samfelagið frá eini útlendskari vinnu, sum eitur oljuvinnan, verður so lítið sum møguligt.

Tað er tí ikki uttan vandar, at vit fara inn í hesa nýggju vinnulívssøguna heldur Jóannes Eidesgaard, sum sigur, at vit rættiliga skjótt eiga at fara undir eitt politiskt orðaskifti um oljuvinnuna, eisini tá vit tosa um búskapargrunn.

- Hvussu kunnu vit stýra hesar inntøkur, so tær ístaðin fyri at gerast ein vanlukka fyri føroyska samfelagið kunnu blíva eitt vælsignilsi, um tað verður væl umsitið! Eg vænti tí, at landsstýrið skjótt fer at taka stig til at eina debatt um avleiðingar av eini oljuvinnu og hvussu hetta samfelagið skal fyrihalda seg til hesa nýggju og ókendu avbjóðing.

Hann sigur annars, at alt hetta ber bráð av, at hetta er ein útlendsk vinna. Tann føroyski parturin í øllum hesum er sera avmarkaður. - Tað er okkara vón, at hesin útviklingurin kann vera til bata fyri alt tað fólkið, sum býr her. Tað er umráðandi, at vit hava tað í huganum, tí tað hava vit gloymt, tá tosað verður um fiskivinnuna. Tað er fólkið, sum eigur tilfeingið. Tí mugu vit politiskt taka stig til, at fólkið veruliga fer at merkja batarnar, sum kunnu verða avleiðingarnar av oljuvinnuni. At tað ikki verður ein rá kapitalistisk verð men ein vinna, sum eisini kann kasta av sær til okkum, sum nú liva og kanska serliga okkara eftirkomarar. Jóannes Eidesgaard heldur annars, at tað er sera óheppið, at hetta landsstýrið ikki hevur sett krav um, at alment føroyskt oljufelag ella optión hjá slíkum gjørdist partur av loyvisgevingini. Hann minnir á, at hetta var nakað, sum andstøðan á tingi legði alstóran dent á.

Eyðun Andreassen, fólkalívsfrøðingur, sum eisini varð hjástæddur til handanina og sum hevur skrivað fleiri áhugaverdar greinar um árinini av hesi vinnu tekur undir við teimum, sum sakna eitt veruligt orðaskifti um avleiðingarnar av oljuvinnuni og hvussu vit ætla at innrætta okkum. - Men tað kemur kanska. Tað er so upp til okkara egnu ábyrgdarfólk at taka slíkt stig leggur hann aftrat.



*Jóannes Eidesgaard telist millum teirra, sum vil hava oljuvinnuna úti kring landið og m.a. til Suðuroyar. Her er hann saman við oljumálaráðharranum og einum modelli til oljuhavn á Drelnesi*

**Báðar greinar á hesi síðuni eru viðmerkingar til hendingina 17. august, tá leitiloyvi vórðu latin í Norðurlandahúsinum. Av eini misskiljing eru hesar greinarnar ikki komnar við í blaðið fyrr. Tær eru tó ikki minni aktuellar í dag.**



# Sandoyarferjan seinkað



Eirikur Lindenskov

Tað hevur gingið trupult hjá Tórshavnar Skipasmiðju at fáa skrokkin til nýggju sandoyarferjuna úr Póllandi, har hann skuldi byggjast.

Upprunaliga skuldi skipasmiðjan fáa skrokkin um mánaðarskiftið mai-juni, men tá varð greitt, at arbeiðið fór at verða nakað seinkað. Nú eru lidnir tríggir mánaðir, og enn er arbeiðið í Póllandi ikki liðugt.

Umboð fyri Tórshavnar Skipasmiðju hava júst verið í Póllandi, men hvørki Poul Mohr ella Gunnar Mohr, stjórar á Skipasmiðjuni vildu siga nakað. Teir arbeiddu við einum tíðindaskrivi, sum varð sent í seinni í gjár ella í dag.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins veit ikki so nógv at siga um málið, tí sum so er tað ikki hansara borð.

– Vit vita bara, at ferjan skal latast okkum um ársskiftið, sigur hann.

Verður ferjan ikki latin Strandferðsluni til tíðina, verður Tórshavnar Skipasmiðja noydd at rinda dagbøtur upp á millum 5 - og 10.000 krónur um dagin. Hetta er innbygt í byggisáttmálan.

Sosialurin skilir, at arbeiðið í Póllandi verður liðugt um einar tvær vikur. Um so er, so hevur Tórshavnar Skipasmiðja hálvanfjórða mánað at gera arbeiðið liðugt.

---

# »Skansabryggjan« heldur enn »Nyhavn«

*Nýggja havnarlagið í Havn er bygt á Skansabogarnar. Tí skjýtur Poul Mohr upp at nevna tað Skansabryggjan*

Eirikur Lindenskov

Nýggja bryggjan í Havn, sum bygd er á Skansabogarnar uttan fyri molan, verður millum manna kallað »Nyhavn«. Men hetta heitið eru øll ikki so fegin um. Ein teirra er Poul Mohr, skipasmiðjustjóri.

– Hatta navnið klingar ikki væl sigur hann, og biður okkum á blaðnum vælsignað lata vera við at nýta hatta navnið.

Sjálvur veit hann ikki rættuliga, hvussu nýggja havnarlagið skal kallast, men skjýtur upp at nevna tað »Skansabryggjan«, tí havnin liggur á Skansabogunum.

– Sum so hevur hatta havnarlagið ongantíð fingið eitt rættuligt navn, sigur Tórfinn Smith, sum er formaður í nevndini fyri Tórshavnar Havn. Hann sigur tó, at undir byggingini hevur hatta verið nevnt Ytra Víðkanin, hóast tað ikki er eitt navn sum so.

Tórfinn Smith heldur hugskotið hjá Poul Mohr at nevna tað Skansabryggjan vera eitt gott hugskot.

---

# Bjarni Djurholm nú í Tinganesi

*Mánadagin tók nýggi landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum við starvi*

Eirikur Lindenskov

Mánadagin tók Bjarni Djurholm við sum nýggjur landsstýrismaður í vinnumálum, eftir at Finnbogi Arge bað um at verða loystur úr starvi.

Bjarni Djurholm hevur fyrr sagt, at hann fer at arbeiða víðari eftir leistinum hjá Finnboga Arge, og at teir politiskt draga somu línu.

Tað eru stór øki, sum Bjarni Djurholm hevur við at gera. Eitt nú skal hann loysa trupulleikanum við Postverki Føroya, har hann fleiri ferðir hevur róð upp undir privatisering, sum Tjóðveldisflokkurin ikki vil hoyra talan um.

Hvat Bjarni Djurholm fer at mæla til, vildi hann ikki siga fyrsta dagin í starvinum. Men at hann varð noyddur at gera okkurt, segði hann.

Seinnapartin í gjár var Bjarni Djurholm á vitjan á Strandferðsluni. Reidar Nónfjall segði við Sosialin, at tey á fundinum fóru at kunna hann um viðurskiftini hjá Strandferðluni - og um nýggja Suðuroyarskipið.

Bjarni Djurholm er kendur sum »miðstaðarpolitikari«, men hann hevur eisini sagt, at uttan eitt sterkt miðstaðarøki fáa vit ikki ment útjaðaran. Eisini hevur hann nevnt, at hann ætlar at gera berghol til Gásadals.

Tá Tórbjørn Jacobsen á løgtingsins røðarapalli boðaði frá, at Almanna- og Heilsuskúlin skuldi leggjast á Tvøroyri, reisti tingmaðurin Bjarni Djurholm seg og segði, at hetta fór ikki at vera uttan svørðslag.

Hvussu leikur fer, fá vit at síggja.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður, handar nýggja landsstýrismanninum Bjarna Djurholm, blómutyssi á móttøku í Tinganesi í gjár*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Fíggjarlógin 410 mia

Eirikur Lindenskov

Gjáramorgunin kunngjørdi Mogens Lykketoft, danski fíggjar-málaráðharrin fólkatingsfíggjarlógaruppskotið fyri 2001, sum helst ikki fer at verða so trupult at samtykkja.

Samlaða fíggjarlógaruppskotið er upp á 410 milliardir krónur, og verður mælt til sparingar upp á 4,2 milliardir krónur.

Eina milliard er ætlanin at brúka gomul, heilsumál og útbúgvingarmál. Hinir flokkarnir í Fólkatinginum skulu verða við til at býta hesar pengar í eini avtalu við stjórnarflokkarnar um fíggjarlógina.

Tískil er hendan milliardin ikki funnin enn, so flokkarnir í fíggjarlógarsemjuni skulu annaðhvørt verða við til at spara hesar pengarnar á fíggjarlógini ella at økja útreiðslurnar hjá skattaborgarunum.

Hetta verður fimta árið á rað, at fíggjarlógin hevur yvirskot, sum næsta ár ætlandi verður upp á 15,5 milliardir krónur, og pengarnir skulu brúkast til at gjalda statsskuldina, sum tískil lækkar til 41% av bruttotjóðarúrtøkuni.

Tær 981,9 milliónirnar, sum danir gjalda Føroyum í blokkstuðuli eru um 0,25% av donsku fíggjarlógini.

---

# Nýggjur telestjóri

Bjarni Askham Bjarnason, sum er 33 ára gamal, verður stjóri í nýggja telefelagnum, Alnót. Hann hevur seinastu árini starvast í landsumsitingini og er í løtuni deildarstjóri í Vinnumálastýrinum. Hann er útbúgvin cand. merc.

Bjarni Askham Bjarnason tekur við starvinum 1. oktober.

---

# Gera dupultskattaavtalu við Grønland

John Johannessen

Á middegi í gjár fór Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, til Grønlands at gera eina dupultskattaavtalu við grønlendska heimastýrið

Dupultskattaavtalan fer millum annað at hava við sær, at føroyiskir sjómenn ikki longur verða noyddir at hava bústað í eini postsmogu í Grønlandi fyri at sleppa undan at verða hart skattaðir í Føroyum av inntøkuni, teir vinna umborð á grønlendskum trolarum.

Ferðin hjá føroyska landsstýrismanninum og konu hansara til Grønlands fevnir eisini um almenna vitjan hjá Josef Motzfeldt og flokki hansara, Inuit Ataqatigiit.